## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi, um kvøldið nakað minni vindur av norði. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin lækkar hhan niður í landsynning. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, um kvøldið veksur hann vindin upp í hvassan vind. Stundum avfall, sum frálíður kavi og hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin hvassur vindur av landnyrðingi og norði og ælingur, sum frálíður kavi. Hitin um frostmarkið. Leygardagin minni vindur av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

# Føroya størsta fjós reist fríggjadagin

**Teir fýra bøndurnir Páll Djóni á Steinum, Poul Müller, Jóhan Petur Brekkstein og Tórfinnur Dalsgarð byggja í felag nýtt fjós í Havnardalið. Fjósið varð reist fríggjadagin**

BÚNAÐUR



Fríggjadagin var stórur dagur í Havnardali, tá nýggja fjósið hjá teimum fýra bóndunum í dalinum varð reist. Talan er um eitt sera framkomið fjós til 130 mjólkikýr. Og tað verður stór broyting frá tí, at hesar kýr ganga leysar og sjálvar gera av, nær tær eta, drekka, ganga, liggja ella verða mjólkaðar til nýtímans tøknina, har tað eru hydrauliskir mjólkiarmar við optiskum myndatóli, sum finna, reinsa og mjólka boppunum. Sjálvvirkandi gimmisvabarar, ið sópa undan kríatúrunum. Fullfóðurblandarin, sum letur frískt fóður í høllina fýra ferðir dagliga. Og bustistøðin, sum strýkur kýrnum, tá tær hava tørv á massagu ella stimbran.

Fjósið og felagið, sum ganga undir heitinum "Íognarfelagið Sandá", liggur niðan fyri fjósið hjá Tórfinni Dalsgarð vestanvert Sandá.

Samlaða íløgan til fjósið og maskinurnar er einar 18 milliónir krónur. Tá alt er komið upp á pláss, fara teir at standa fyri einum sjeyndaparti av samlaðu mjólkarframleiðsluni í landinum.

Í løtuni framleiða teir íalt 970.000 litrar árliga, men ætlanin er at koma upp á 1.200.000 litrar. Eins og higartil er ætlanin at keypa upp kvotur, bæði frá MBM og øðrum bøndrum, sum leggja neytahaldið frá sær. Tey fýra festini fevna um tilsamans 25 merkur av landsjørð, harav 68 hektarar longu eru veltir. Ætlanin er at koma upp á eini hundrað hektarar, tá framleiðslan kemur í hæddina.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -24 |
| Nuuk | -17 |
| Qaqortoq | -15 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 8 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 16 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 991 hPa. skamt í landnyrðing úr Føroyum grynnist. Eitt annað lágtrýst, 982 hPa. á 53N~34V fer móti Skotlandi.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Skotland fer eystureftir og gevur høgætt á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/3 kl. $06^{00}$ – 27/3 $06^{00}$. Hitin í gjár: 2°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 26/3 kl. $06^{00}$ – 27/3 $06^{00}$.
Avfallið higartil í apríl: 96 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

21. mars Fullmáni
26. mars Mánin longst frá jørðini
29. mars Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. mars | 03.00 | 15.23 | 02.00 | 14.23 | 02.15 | 14.38 | 05.00 | 17.23 | 06.00 | 18.23 | 01.15 | 13.38 | 00.15 | 12.38 | 03.15 | 15.38 | 04.15 | 16.38 | 02.45 | 15.08 | 04.00 | 16.23 |
| 1.apríl | 3:45 | 16:07 | 2:45 | 15:07 | 3:00 | 15:22 | 5:45 | 18:07 | 6:45 | 19:07 | 2:00 | 14:22 | 1:00 | 13:22 | 4:00 | 16:22 | 5:00 | 17:22 | 3:30 | 15:52 | 4:45 | 17:07 |
| 2.apríl | 4:28 | 16:49 | 3:28 | 15:49 | 3:43 | 16:04 | 6:28 | 18:49 | 7:28 | 19:49 | 2:43 | 15:04 | 1:43 | 14:04 | 4:43 | 17:04 | 5:43 | 18:04 | 4:13 | 16:34 | 5:28 | 17:49 |
| 3.apríl | 5:09 | 17:30 | 4:09 | 16:30 | 4:24 | 16:45 | 7:09 | 19:30 | 8:09 | 20:30 | 3:24 | 15:45 | 2:24 | 14:45 | 5:24 | 17:45 | 6:24 | 18:45 | 4:54 | 17:15 | 6:09 | 18:30 |
| 4.apríl | 5:51 | 18:12 | 4:51 | 17:12 | 5:06 | 17:27 | 7:51 | 20:12 | 8:51 | 21:12 | 4:06 | 16:27 | 3:06 | 15:27 | 6:06 | 18:27 | 7:06 | 19:27 | 5:36 | 17:57 | 6:51 | 19:12 |